Ferðsluóhapp um vikuskiftið

Sjey ferðsluóhapp vórðu fráboðað løgreglurni í Havn um vikuskiftið. Í trimum førum hedni stórur materiellur skaði

LØGREGLUTÍÐINDI
Edvard Joensen

Trý ferðsluóhapp við størri materiellum skaða komu í døgnrapportina hjá løgregluni í Havn um vikuskiftið. Men sum heild var annars riðaligt.

Sjey ferðsluóhapp vórðu fráboðað. Trý teirra við stórum materiellum skaða.

Seinnapartin fríggjadagin var ein bilur ákoyrdur aftan í frá við Statoil støðina í Kollfjarðardali. Hann stóð aftan fyri ein annan og bíðaði eftir at sleppa inn á støðina, tá ein triðji bilur koyrdi upp í reyvina á honum og renda hann víðari fram í tann fremra bíðandi bilin.

Allir tríggir bilarnir fingu skaða, og ein persónur varð koyrdur á skaðastovuna. Tó við smærri løstum, sum ikki høvdu nógv upp á seg.

Seinni um kvøldið var aftur eitt líknandi óhapp uttan fyri Gamla Kirkjugarð í Havn.

Ein bilur, sum kom heim gjøgnum Jóanes Patursonargøtu, stóð og bíðaði eftir at sleppa niðan eftir Dalavegnum, tá ein annar bilur, sum eisini kom heimeftir, rendi upp í reyvina á honum. Samstundis var ein motorsúkkla á veg úteftir, og tann aftari bilurin, rendi so eini á hana. Eingin persónsskaði hendi í tí óhappinum, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Leygardagin var eitt ferðsluóhapp bein niðan fyri kirkjuna við Sjógv í Kollafirði.

Ein bilur, sum kom koyrandi inneftir, endaði yviri í skeivari vegsíðu og rendi saman við ein bil, sum kom úteftir.

Stórur materiellur skaði var, og báðir bilførararnir fóru á skaðastovuna til kanningar, sigur løgreglan.

Tær vanligu syndirnar

Vikuskiftið hevur verið sum vanligt, sigur vakthavandi á politistøðini i Havn

LØGREGLUTÍÐINDI
Edvard Joensen

Tað var tað vanliga, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Drukkin fólk og ferðsluóhapp.

Eini fýra fólk máttu sova rúsin av sær á støðini, og ein varð tikin fyri at koyra ávirkaður.

Onkunstaðni vóru fólk so mikið ósamd innanveggja, at løgreglan varð boðsend at mekla.

Aðrastaðni vóru fólk í so góðum lag, at vindeyguni fóru upp, og tónleikurin, sum kom út ígjøgnum, gjørdist í so harður fyri grannar, sum ikki fingu sovið. Løgreglan varð boðsend at fáa skrúvað fyri, og tað gekk heilt væl, sigur vakthavandi. Hóast fólk eru drukkin, og ikki hugsa so nógv um trupulleikan, skilja tey vanliga væl, tá tosað verður hampiliga við tey, at tað ber ikki til at hava ov hart frá. Og soleiðis var eisini í hesum førinum.

Sunnumorgunin rann olja oman eftir Velbastaðvegnum fram við kirkjugarðinum. Tað vísti seg, at hol var komið á ein stóran tanga longri úti. Sløkkiliðið varð boðsent, og oljan varð pumpað úr skadda tanganum, uttan at tann heilt stóri skaðin hendi.

Og so varð eisini ein parkeraður bilur í Eysturbýnum, sum hevði havt óvæntaðar gestir, sum høvdu skøvað síðurnar og motorhjálmin.

Júst skaðar á parkeraðar bilar sær løgreglan regluliga. Og tað hendir næstan líka ofta, at tann, sum skaðan ger, bara rýmir uttan at siga frá.

Aftur hetta vikuskiftið var eitt slíkt dømi. Ein bilur varð ákoyrdur við Statoil støðina í Gundadali av einum gomlum Opel Ascona. Hesin bilurin rýmdi uttan at boða frá.

Tað er næstan ikki vikuskiftið, at ikki ein slíkt fráboðan kemur til okkara, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Styrkja seg til ólavsøku

Av politistøðini í Havn verður sagt, at tey styrkja seg til ólavsøku. Bæði við fólki og longri vaktum

LØGREGLUTÍÐINDI
Edvard Joensen

Fleiri løgreglufólk verða til arbeiðis í Havn um ólavsøkuna, enn tey eru vanligar dagar.

Tað er tó einki øðrvísi, enn gjørt hevur verið ár um ár, at tað koma fleiri løgreglufólk aðrastaðni úr landinum til Havnar at arbeiða á ólavsøku.

Men eisini onkrar innhýsis broytingar verða um ólavsøkuna, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Vaktirnar verða longdar úr átta tímum upp í tólv tímar, sigur hann. Tað fer at geva møguleikar fyri betri eftirliti.

Løgreglan í Havn er ikki nóg væl mannað til at klára ólavsøkuna einsamøll, og tí verður fólk boðsent aðrastaðni frá eisini. Eitt nú úr Klaksvík fara eini trý fólk til Havnar á ólavsøku, upplýsir sýslumaðurin í Norðoyum.

Vakthavandi í Havn sigur, at tað í stóran mun er fult fólk, sum setir dám á teirra arbeiðsdag um ólavsøkuna.

Nógv er at skála fyri, og fleiri fløskur verða tømdar longu undir kappróðrinum, sigur hann. So hjá summum verður ólavsøkan ikki serliga long.

Tað velst eisini ein heilan hóp um veðrið, hvussu arbeitt verður á ólavsøku. Er gott veður, verða ikki øll, sum fráboðan er komin um, tikin inn á støðina. Men er veðrið ikki til vildar, kann gerast trupult at fáa einakamar her yviri, sigur vakthavandi.

Hann leggur dent á, at løgreglan hyggur til øll, sum fráboðan kemur um. So verður mett í hvørjum einstøkum føri, um ráðiligt er at lata viðkomandi verða liggjandi.

Men tað verður altíð hugt aftur til ein slíkn persón. Og ofta vísir tað seg, tá løgreglufólkini koma aftur, at hann ella hon er farin. Annaðhvørt av sær sjálvum, ella tí at onkur hevur hjálpt teimum aftur á føtur.

Sagt verður av politistøðini í Havn, at løgreglan fer at vísa seg sum mest millum fólk á ólavsøku.

Aftur grind í Vágum

Triðja grindin í Vágum hesar seinastu tríggjar vikurnar lá fyri Bø, beint áðrenn blaðið fór til prentingar

GRIND
Edvard Joensen

Tvær grindin eru deyðar í Vágum í summar. Tann triðja lá fyri Bø, tá blaðið fór til prentingar. Myndir er frá merkingini av grindini, sum doyði í Sandavági 6. juli

Mynd: Edvard Joensen

»Tað liggur ein grind á Seyrvágsfirði«. Soleiðis byrjar tann altíð aktuella skaldsøgan Feðgar á ferð. Og aftur í gjár, beint áðrenn blaðið fór til prentingar, lá ein grind á firðinum.

Sagt varð av sýsluskrivstovuni í Miðvági, at ætlanin var at halda henni til út á seinnapartin. Hvussu stór hon var, vistu tey ikki rættiliga at siga, men aðrastaðni frættist, at hon mundi vera oman fyri hundrað hvalir.

Av sýsluskrivstovuni frættist, at tað er stórur áhugi fyri grindini aðrastaðni í landinum. Telefonin ringir alla tíðina, siga tey. Tað er fólk, sum vil keypa, eins og eisini fleiri kommunur eru áhugaðar í at fáa ein bita av grind, nú so væl tykist vera til í Vágum í ár.

Sagt verður, at drápspartar verða býttir, men ikki verður roknað við heimapørtum í Vágum hesaferð. Tó var tað ikki endaliga avgjørt, tá vit tosaðu við sýsluskrivstovuna, áðrenn evstamark í gjár. Men lítið var at ivast í, varð sagt, at flutt fór at verða av oynni.

- Tað skal meira enn ein góður sangur til at sláa ígjøgnum

Danski sangarin og plátuvendari, Freedom, vitjaði í Føroyum í vikuskiftinum. Hann sigur, at tað hevur tikið langa tíð hjá honum at sláa ígjøgnum. Framførslan hjá honum leygarkvøldið var tó einki serlig

Heri á Rógvi

Við eitt av borðinum í Café Natúr sita fýra fólk. Tað er danski sangarin og plátuvendarin, Freedom, sum situr saman við trimum øðrum. Hini eru Gitte-Reneé, Kasper og Sune, og tey eru ávíkavíst dansarar og ljóðmaður. Freedom, eisini kendur sum Hans Henning Schmidt, er bæði blíður og týður, og hann er ógvuliga lættur at tosa við.

Tey siga øll við einum munn, at tey ikki kendu nógv til Føroyar áðrenn tey leitaðu sær til oyggjarnar. Tað høvdu hoyrt, at her skuldi verið ógvuliga vakurt, og hetta høvdu tey eisini sannað tað teir tímarnar teir høvdu verið her.

Byrjaði sum ungur

Freedom byrjaði á heilt ungum aldri at vera plátuvendari. Tað var longu í fólkaskúlanum, at hann fyrstu ferð fekk pengar fyri at venda plátum. Hetta hevur hann síðani hildið áfram við, og í dag er hann 27 ár og tað má sigast at ganga rættiliga gott.

Hann er kendur víða hvar í Danmark, men hevur ikki havt eydnuna við sær uttanfyri danska kongaríkið higartil. Hetta er fyrstu ferð, at hann fer útum syðra endan av kongaríkinum fyri at spæla.

- Eg eri ótrúliga spentur um, hvussu tað fer at ganga við at spæla í Føroyum, og eg havi glett meg nógv seinastu tíðina, sigur Freedom.

Hann sigur seg vera ógvuliga rørdan yvir, at fólk í Føroyum hava tikið tónleiki hjá honum til sín, og hann fegnast yvir, at lagið hjá "Hold On" leingi hevur verið at sæð ovarliga á tónatindunum í Føroyum.

- Eg kenni sum so einki til føroysk tónleik ella Føroyar, men eg eri spentur at vita, hvat eg kann koma at kenna hesa stuttu tíð í Føroyum, sigur Freedom.

Tók langa tíð at sláa ígjøgnum

Sum áður nevnt, so hevur Freedom verið virkin í rættiliga langa tíð, men tað er fyrst í seinastuni, at hann veruliga hevur fingið sítt gjøgnumbrot. Tað Jesper Landgaard, sum í sínari tíð gjørdi lagið "Hang On", men hetta gjørdist ikki nakað hit hjá honum. Lagið kom tó fyri oyra á Freedom, og hann byrjaði at spæla sær við lagið, tá hann ferðaðist úti sum plátuvendari. Hetta gjørdist skjótt so væl móttikið, at hann fór at kanna møguleikarnar at geva lagið út. Hetta gjørdist trupult, og tað tók eisini eini tvey ár áðrenn tað eydnaðist Freedom at fáa lagið givið út. Hetta var eftir, at hann hevði gjørt eina nýggja útgávu av sanginum, og er tað hendan, sum er vorðin so sera væl umtókt. Sangurin hevur ligið sum nummar 2 á danska hitlistanum yvir stakfløgur.

Freedom, her avmyndaður saman við sínum dansarum og ljóðmanni, var í Føroyum í vikuskiftinum

Freedom kallar sjálvur sín tónleik fyri pop. Hann sigur, at fyri at sláa ígjøgnum so skal meira enn ein góðan sangur til, hetta hevur hann ásannað.

- Tað hevði ikki eydnast mær at sligið ígjøgnum um eg ikki hevði havt baklandið við mær, sigur Freedom.

Vána framførsla

Undirritaði stak ein túr inn á gólvið, tá Freedom spældi leygarkvøldið. Frammanundan hevði hann sagt, at tað mesta fór at vera "play back", og tá skal sigast, at hann helt sítt lyfti. Røddin hjá Freedom hoyrdist tó í løtum. Tað eydnaðist honum at fáa áhoyrarnir upp at koyra, so tá hevur framførslan uttan iva verið góð. Fyri ein, sum stóð og hugdi at, so var tað ein einki serliga góð framførsla, ið ein sá. Synkroniseringin var til tíðir so vánalig, at tað næstan var láturligt. Freedom er kanska ikki heimsins besti sangari, men ein kundi ynskt sær meira frá honum. Tað eydnaðist at fáa tað at koyra hjá einum stórum parti av áhoyarnum, men tá tað er sagt, so kundi ein lættliga ynskt sær meira teir 35 minuttirnar hann stóð á pallinum.